# Bretar bjó›a øki út til oljuleiting

**Bretar hava bjó›a› út til komandi olju-leiting øll økini fram-vi› føroyska markin-um. Feløgini í The Faroes Partnership og fyribils vi› undantaki av Atlants Kolvetni fara at bjó›a**

OLJULEITING
*Jan Müller*




*Skravera›u økini upp at markinum millum Føroyar og Bretland eru tey, sum bretskir myndugleikar hava luta› út til oljufeløgini*

Tann nógv eftirspurda 19. útbjó›ingin í bretskum øki er nú vi› at koma undir land. Herfyri kunngjørdu bretskir myndugleikar, at oljufeløg kunnu bjó›a uppá teigar í tí fyrrverandi Hvítu sonuni, sum eru økini uppat føroyska markinum. Freistin at søkja um boriloyvi er 27. februar. Til ta tí› skal eisini umhvørvisligi spurningurin, sum Greenpeace reisti og fekk vi›hald í, ver›a avgreiddur.

Feløgini í The Faroes Partnership-samtakinum ætla sær at søkja í komandi bretska umfarinum sigur Jan Evensen, stjóri hjá Amerada Hess. Tá ver›ur tó ikki føroyska oljufelagi› Atlantic Petroleum vi›. Ta› skal fyrst ígjøgnum eina gongd, har ta› má blíva gó›kent av bretskum myndugleikum at kunna leita eftir olju og gassi á bretska landgrunninum. Í dag er føroyska oljufelagi› meira at meta sum ein fíggingarstovnur, sum er í fer› vi› at byggja upp serkunnleika og royndir til eisini at kunna gerast eitt veruligt leitifelag. Hetta ver›ur helst í næsta ár, solei›is at føroyska felagi› tá helst kann gerast partur av loyvinum, sum Jan Evensen vónar, at teirra bólkur fær á bretskum øki.

Sosialurin skilur, at teir fara eftir einum ávísum øki, sum liggur tætt upp at tí loyvinum, sum teir longu hava á føroyska landgrunninum. Hetta kann merkja, at talan er um prospekt, sum bæ›i liggja á føroyskum og bretskum øki. Ta› fáa vit tó ikki vátta›. Í sambandi vi› marknaavtaluna vi› bretar var› eisini tikin hædd fyri, at ta› kann henda, at sama oljukelda liggur bá›umegin marki›. Hetta merkir, at feløgini, sum fara at bora á føroyskum øki næsta summar, kunnu fáa t‡›andi uppl‡singar, i› tey kunnu brúka í leitingini í komandi bretsku útbjó›ingini skamt frá føroyska markinum.

## Sovereign Explorer til Hess

Í bla›num í gjár vísti stjórin í Amerada Hess, Jan Evensen á, at The Faroes Partnership samtaki›, sum Atlants Kolvetni er partur av, fer at bora vi› Føroyar í juli næsta ár. Sosialurin kann í dag uppl‡sa, at Amerada Hess hevur skriva› undir »a letter of intent« vi› eigararnar av boripalinum Sovereign Explorer, Transocean, um leigu av boripallinum frá 17. juli næsta ár at bora sín fyrsta brunn á føroyska landgrunninum. Statoil bólkurin hevur annars leiga› pallin frá mars til mi›jan juli at bora ein brunn vestan fyri Írland og ein vi› Føroyar. Ta› tekur umlei› 50 dagar at bora ein brunn, og ta› merkir sostatt, at Statoil fer longu at bora vi› Føroyar í endanum av mai ella í byrjanini av juni. BP hevur bo›a› frá, at teir fara at bora seint í juli ella tí›liga í august næsta ár. Hetta merkir sostatt, at ta› fer at ver›a bora› á føroyska landgrunninum út í eitt frá seinnu helvt av mai til inn í oktober mána›. Tá veldst tó sjálvandi eisini um ve›ri›. BP fer, um umstø›urnar laga seg rætt, at bora tveir brunnar, me›an hini samtøkini bora hvør sín brunn. Allir brunnarnir eru ni›ri í tí sokalla›a Gullhorninum nærhendis verandi oljukeldunum á bretskum øki.

# Thor í Hósvík samstarv vi› ESVAGT

**Eitt nú felag undir stovnan vi› luttøku av Thor í Hósvík og ESVAGT í Esbjerg skal kunna nøkta tørvin á standby- og rescueuppgávum, tá leitingin eftir olju byrjar á føroyska landgrunninum næsta ár**

OLJULEITING OG SKIPATÆNASTUR
*Jan Müller*



*Ovin Carlsson, stjóri hjá ESVAGT í Esbjerg vísir fram ein av serútgjørdu bjargingarbátunum hjá felagnum. Hann fer nú at samarbei›a vi› Thor í Hósvík um komandi standby- og rescueuppgávur í komandi leiting vi› Føroyar.*

*Mynd Jan Müller*

Rei›aríi› Thor í Hósvík, sum í fleiri ár hevur leiga› skip síni út til oljuvirksemi ymsa sta›ni í heiminum, hevur nú gjørt avtalu vi› danska felagi› ESVAGT í Esbjerg um samvinnu, nú oljuleiting vi› Føroyar stendur fyri framman. Arbeitt ver›ur vi› at gera eitt n‡tt felag, ESVAGT-Thor, sum skal bjó›a seg fram til at leiga út skip til standby- og bjargingaruppgávur í sambandi vi› komandi leiting vi› Føroyar. Í dag átekur Thor sær serliga vaktar- og flutningsuppgávur í sambandi vi› oljuvirksemi til havs.

Gunnbjørn Joensen, sum starvast hjá Thor, sigur, at samstarvi› vi› ESVAGT merkir, at teir vera nógv betur fyri at nøkta tørvin hjá teimum fyritøkunum, sum nú fara í gongd vi› at leita eftir olju og gassi á føroyskum øki.

– Vit ver›a nógv betur førir fyri at bjó›a okkum fram til komandi oljuvirksemi› og kunnu átaka okkum mest sum allar uppgávur vi› hesi samvinnuni sigur Gunnbjørn Joensen.

Ta› er ein føroyingar, sum í dag er stjóri í ESVAGT. Ta› er Ovin Carlson av Tvøroyri. Fyritøkan, sum stendur fyri flestu av skipauppgávunum í sambandi vi› oljuvirksemi› í Nor›sjónum, eigur 13 skip, sum í dag nøkta stóran part av tørvinum hjá flestu av oljufeløgunum, i› arbei›a í danska partinum av Nor›sjónum. Serliga arbei›ir ESVAGT fyri Amerada Hess og Statoil.

Sum naka› n‡tt hevur Thor í Hósvík gjørt avtalu vi› Per Gulklett, sum ver›ur rá›gevi hjá felagnum. Hann fer serstakliga at taka sær av uppgávum, sum hava vi› skipamekling at gera men fer eisini at brúka sínar royndir í Mærsk til at gagna Thor, nú felagi› fer í samvinnu vi› ESVAGT fyri at vera vi› í komandi oljuleiting vi› Føroyar.

Gunnbjørn Joensen sigur, at teir vi› hesum samarbei›i kunnu fáa nógv know how og er eisini ætlanin, at skipini hjá ESVAKT, sum koma til Føroya, ver›a manna› vi› føroyingum.

Thor hevur bo›i› seg fram á bretska markna›inum eisini, men hava lagt til merkis, at ta› er torført at fáa sáttmálar, tí bretsk rei›arí ver›a favorisera›. – Vit hava dømi um, at bretsk feløg hava tiki› av tilbo›um frá bretskum rei›aríi, sum hava veri› 54% d‡rari enn okkara tilbo›. Er hetta teirra politikkur, so eiga teir eisini at rokna vi›, at ta› sama ver›ur galdandi hesumegin marki›. Man kundi ynskt sær, at ta› var eitt sindur fríari kapping í bretskum øki. Máli› var› annars tiki› upp á fundinum millum Elttør og Lidell í Stavanger í august. Landsst‡risma›urin seg›i tá vi› bretska starvsfelagan, at bretsk feløg ver›a favorisera›. Lidell vildi kanna hetta máli›.



*Per Gulklett, sum hevur drúgvar royndir hjá Mærsk, skal nú vera rá›gevi hjá n‡ggja samstarvinum millum Thor og ESVAGT. Her er Per Gulklett, sum er úr Nólsoy, á høvu›sskrivstovuni hjá Statoil í Stavanger.*

*Mynd Jan Müller*



# Útselt til Pippi



*Beinta Clotier hevur høvu›sleiklutin sum Pippi*

**Tá Havnar Sjónleikararfelag hálvan desember hevur seinastu s‡ning av leikinum Pippi, hava fleiri enn 5.000 fólk sæ› leikin**

SJÓNLEIKUR
*Eirikur Lindenskov*

Sí›ani 21. november hevur Havnar Sjónleikararfelag framført leikin Pippi, og longu fyri vikum sí›ani eru øll atgongumerkini útselt líka fram til 15. desember. Birita Krossteig, dagligur lei›ari í Sjónleikarhúsinum sigur vi› Sosialin, at hetta er eitt positivt tekin um, at fólk hava funni› út av at bíleggja atgongumerki frammanundan.

– Ta› er sera stuttligt, um so er, tí ta› ger ta› nógv lættari hjá okkum at leggja leikir til rættis, sigur hon. Vanliga er ta› so, at útselt er til frumframførsluna, men so kunnu tey framføra leikir í fleiri dagar, uttan at nógv fólk kemur. Ikki fyrr enn tey fara at l‡sa vi›, at seinasta s‡ning nærkast, ressast fólk, og so er aftur útselt. Hetta ger ta› trupult hjá sjónleikarum og fyrireikarum at leggja til rættis, tí ikki ber til at vita, nær ein leikur endar.

Hóast so at siga útselt var, tá vit tosa›u vi› Biritu Krossteig fyri gó›ari viku sí›ani, so var tó onkurt einkult atgongumerki eftir.

– Vit hava ikki enn tosa› um eykas‡ningar, men greitt er, at ta› er sera strævi› hjá leikarum – kanska serliga hjá Beintu Clotier, sum er meira enn 110% á pallinum í leiklutinum sum Pippi – hon bæ›i dansar, syngur og hoppar, sigur Birita Krossteig.

Ta› er Elin Mouritsen, sum hevur leikstjórna›, og hesi uppgávu er hon komin sera væl frá, sigur Birita Krossteig.

– Hon dugir so sera væl, og hevur sera gott eyga fyri slíkum, sigur Birita Krossteig.

Edvard Fuglø hevur veri› senografur, og hann yvirgongur seg sjálvan hvørja fer›, sigur hon. Hann hevur eisini gjørt búnarnar.

Jóhannus á Rógvu hevur sta›i› fyri ljó›inum – og hevur Sjónleikarhúsi› til hetta høvi› útvega› sær n‡ggja ljó›útger›.

Birita Krossteig leggur at enda dent á, at tey sum hava sta›i› aftan fyri leikin hava havt sera stóran t‡dning fyri, at leikurin hevur veir› so væl eydna›ur.

Tá seinasta s‡ning hevur veri›, hava útvi› 5.000 fólk sæ› leikin.

## Skifti sí›u og bleiv forma›ur

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Mi›vágur:** N‡valda bygdarrá›i› í Mi›vági hevur skipa› seg vi› Jóan Paula Fredriksen sum formanni. Tríggir listar vóru til kommunuvali› í Mi›vági. Listi B, C og D. Stilla var› upp politiskt og listi D var ein borgaralisti, C javna›arlistin og B sambandslistin.

Listi D fekk f‡ra limir í bygdarrá›i›, javna›arlistin tveir og sambandslistin ein kommunust‡rislim. Jóan Pauli Fredriksen á lista D fekk 41 atkvø›ur. Hann fór í samgongu vi› javna›ar og sambandslistan og gjørdist forma›ur. Næstforma›ur er Johannes Ellefsen av sambandslistanum.

# Jørgen-Frantz 100 ár

Í dag 29. november eru li›in 100 ár sí›ani Jørgen-Frantz Jacobsen var› føddur. Hóast hann bert skriva›i eina skaldsøgu, og hóast hann doy›i ungur í 1938, so er hann saman vi› Williami Heinesen kendasta skald okkara – ikki minst úti í heimi.

Jørgen-Frantz Jacobsen var› føddur í Havn og vaks upp í Grím Kambandsgøtu, ella Konradsbrekku, sum hon eisini ver›ur kalla millum havnarfólk.

Jørgen-Frantz var sonur Martin Meinhard Jacobsen (1862-1917). Mamma hansara, Maren Frederika Mikkelsen var fødd í Elduvík.

Í sambandi vi› fø›ingardagin gevur forlagi› Fannir út forvitnisliga bók »Vit skulu sjálvir«. Hetta eru tekstir, sum Jørgin-Frantz skriva›i í bla›num Tingakrossi og so eisini naka› av tí, sum hann skriva›i í donsku avísini Politiken 1925-36 og sum ikki er vi› í »Nordiske kronikker«. Ritstjóri á hesi forvitnisligu



útgávu er Turi› Sig›ur›ardóttir.

I kvøld skipar Nor›urlandahúsi›, Rithøvundafelagi› og tey, i› kn‡tt eru at verkætlanini »Fer›in« fyri kvøldsetu í Nor›urlandahúsinum. Millum anna› ver›ur høvi› at síggja júst ta› handriti›, sum Nils Malmros tekur stø›i í í greinini í Sosialinum lyegardagin. Hetta er upprunaliga handriti› til søguna um Barbu, júst so sum Jørgin-Franzt skriva›i ta›.

Í forhøllini í Nor›urlandahúsinum ver›a eisini s‡nd fram brøv og myndir og eitt n‡tt listaverk, sum Edward Fuglø hevur mála› vi› stø›i í brøvum hjá Jørgin-Frantz. Burtúr fjølbroyttu skránni fyri kvøldsetuna kann nevnast, at føroysku tónaskøldini Tróndur Bogason og Sunnleif Rasmussen hava arbeitt vi› tekstum eftir, ella kn‡ttir at Jørgin-Frantz. Kórsatsur, sum Tróndur hevur gjørt til yrkingina hjá Janusi Djurhuus »Songur til lívi›«, ver›ur fyrstu fer› at hoyra, og Sunnleif fer at grei›a frá um n‡ggja tónlistaverki. »Fer›in«. Hetta er verkætlan, sum Urd Johannesen stendur fyri.

Verki› byggir á tekst, sum Jørgin-Frantz skriva›i á n‡ggjárinum 1921.

Úr Danmark kemur Hanne Flohr Sørensen, sum fer at grei›a frá um lív og verk hjá skaldinum.

Fyri Gyldendal stjórnar hon stórum bókmentunarligum verki um Jørgin-Franzt, sum kemur út næsta ár. Úr sjónleikarabókinum Grímu fara vit eisini at hoyra Ega Dam og Hans Tórgar› at framføra leikmynd úr ví›agitna brævaskiftinum millum William og Jørgin-Frantz. Óney›ugt skuldi havt veri› at sagt, at ídni brævskrivarin Jørgin-Frantz telist millum teirra, sum pr‡tt hava føroysk frímerki. Kvøldsetan á hundra› ára degi skaldsins endar vi› at Petra Iversen syngur Kingolagi. »Sorrig og glede«, sum júst er annar av sálmunum, sum n‡ttir ver›a gjøgnum filmin hjá Malmros um Barbu.

Kvøldsetan, sum er almenn, byrjar mikuvøldi› klokkan 19:30 og er ókeypis.

## Bilmekanikarar vi› sera gó›um úrsliti

SVEINAPRÓGV
*Eirikur Lindenskov*

Fríggjadagin stó›u f‡ra n‡ggir bilmekanikarar sveinaroyndina á Tekniska Skúla í Havn.

Hetta er fyrstu fer›, at mekanikarar standa sveinaroynd eftir n‡ggju skipanini, og úrsliti› var avbera gott, sigur Eirikur Ó. Simonsen, sum er lærari á Tekniska Skúla.

Mi›alkarakterurin hjá næmingunum var 9,75 – og tveir av n‡ggju mekanikarunum fingu hvør sítt trettantal í einkultlærugreinum.

Teir, i› stó›u sveinaroyndina fríggjadagin vóru: Jógvan Højgaard, Tórshavn, sum hevur lært hjá P/F DB Bilum í Havn, Sunleif Pattinson úr Funningsfir›i, sum hevur lært á Bilverksta›num á Skála, Henrik Weihe Joensen í Søldarfir›i, sum hevur lært hjá Sp/F Ó.C.D og Erling Larsen úr Fuglafir›i, sum hevur lært hjá P/F Meinhardt Arge í Havn.



*Teir, i› stó›u sveinaroyndina fríggjadagin vóru: Jógvan Højgaard, Tórshavn, sum hevur lært hjá P/F DB Bilum í Havn, Sunleif Pattinson úr Funningsfir›i, sum ehvur lært á Bilverksta›num á Skála, Henrik Weihe Joensen í Søldarfir›i, sum hevur lært hjá Sp/F Ó.C.D og Erling Larsen úr Fuglafir›i, sum hevur lært hjá P/F Meinhardt Arge í Havn.*